# ðpallinum



*Momo og hini høvdu tað so gott, inntil snildu, gráu menninir komu sníkjandi ...*

sera sannførandi við sínum eyðkenda griska mytologiska dámi.

Fyri stuttum fekk Tjóðpallurin eitt nýtt ljóðanlegg, sum er gjørt til hølið á gamla meiarínum og nú verður nýtt fyri fyrstu ferð. Millum annað hava leikarnir inn ímillum mikrofon uppi á sær, sum eisini er við til at geva uppsetingini ein modernaðan dám. Eisini ljósútgerðin hevur fingið fleiri møguleikar at skapa ymsar effektir, og júst í hesum leikinum verður nútímans tøknin brúkt til sítt ítarsta.

– Øll hendan tøkini er ótrúliga hugtakandi, men man skal ansa eftir, at hon ikki yvirtekur ella verður trýst niður yvir leikirnar, bara fyri at sleppa at brúka hana. Tað skal vera leikurin, sum brúkar útgerðina og ikki øvugt, sigur Ria.

**Tey ungu**

Á Tjóðpallinum vóna tey eisini, at nýggju møguleikarnir við ljóð og ljósi kunnu vera við til at freista tey ungu at koma til sjónleik. Júst tey ungu hava kanska verið eitt sindur við sviðið soð, tá tað ræður um sjónleikir, halda tey, men vænta at Momo avgjørt ein leikur, tey ungu kunnu kenna seg aftur í.

- Nógvir av spurningunum, sum koma fram í leikinum, eru jú sovorðnir, tannáringar ofta baksa við. Vit minnast ivaleyst øll, hvussu vit hugleiddu um, hvør meiningin er við øllum, og hví vit bera okkum at, sum vit gera, sigur Ria og trívir aftur í nýggja tøknina í húsinum.

- Tað er eitt sindur ironiskt, tí við nútímans tøknini hava vit fingið serliga góðar møguleikar at skapa júst tað zapparauniversið, sum leikurin kritiserar ...

Í so máta endurspeglar pallsetingin kanska júst tað tvístøðu, leikurin ímyndar. Vit duga væl at síggja tað meiningsleysa í øllum gerandisresinum, men samstundis eru vit bebbarødd fyri at dragna afturúr. Ella sum Beppo í leikinum hugleiðir, meðan hann skundar sær at feia eitt sindur skjótari

- Hvar hevði eg verið, um eg ikki fylgdi við? Eg hevði verið ein tíðarspilla ... eg hevði verið uttanfyri ...

## Klassiskt ævintýr

Leikurin Momo byggir á skaldsøguna hjá týska rithøvundanum Michael Ende. Søgan er eitt klassiskt ævntýr um løgnu gentuna Momo, sum kemur til ein bý, har fólk liva í sátt og semju við hvønn annan í einum hugnaligum og friðarligum gerandisdegi. Býarfólkini taka væl ímóti Momo og lata hana sleppa at búgva í gamla, niðurlagda amfiteatrinum uttanfyri býin. Tey hava góða tíð, so tey vitja dúgliga klóku og vinarligu Momo, sum altíð er so væl nøgd við alt. Men knappliga broytist alt, tá ein herur av gráum monnum síkja seg inn í býin. Snildisliga sannføra teir býarfólkini um, at um tey royna at spara tíð, er tað sum at seta hana í bankan, tí tá fara tey at fáa tíðina tvífalt aftur. Og so hevur ongin knappliga tíð til nakað longur, heldur ikki at vitja Momo, sum situr einsamøll eftir úti í gamla amfiteatrinum.

Men Momo veit eitt loyndarmál, og so byrjar stríðið, móti gráu monnunum, um at fáa tíðina aftur ...



# Fragd fyri eygað og forkunnugan fiskarætt

**Suðuroyggin átti at satsa meira uppá ferðavinnu í framtíðini, halda fleiri. Og produkthugskot tróta ikki. Trupulleikin er bara, at ongin loftar teimum, og ger tey søluklár**

FERÐAVINNA

*Anna Mortensen*

Einaferð stóð eitt busskýlið fram við vegnum á Tvøroyri - innilokað við beinki og øllum. Veit ikki hví, men brádliga var tað burturi, beint inn á eitt vendipláss, og har stóð tað leingi. Hálvavegna burturbeint stóð tað nú á høvdinum. Og ein góðan summardag sóust tvey fronsk ferðafólk, so tolin, standa frammanfyri skýlinum. Tey stóðu leingi, áðrenn tey fingu at vita, at hagar kom bussurin ikki, tí skýlið var burturbeint... Hetta var einaferð fyrst í 80´unum, tá flakavinnan var í hæddini, og útlendingarnir í bygdini hitti man til arbeiðis niðri á flakavirkinum. Nú, 20 ár seinni, høvdu hesi bæði fronsku ferðafólkini óivað leitað sær inn á kunningarstovuna og fingið leiðbeining. Flakavinnan syrgir ikki longur fyri, at útlendingar koma hendavegin á sumri, her er deydligt, sum sjálvdan áður. Og stundum hittir tú fólk á máli, ið næstan gerast eitt sindur firtin, tá tey hoyra um eina møguliga framtíðar ferðavinnu her í oynni: "vit hava onki veðurlag, ongar sólstrendur og ongar heitar keldur... hvat skuldu vit havt at bjóða útlendingum?

Men nú vit skriva 2005 verður tosað nógv - í krókunum - um ferðavinnumøguleikar í Suðuroynni. Nakrar eldsálir hava altíð verið í hesi vinnu, og tær tykjast nú fleiri. So vónandi fara tankar og hugskot hjá teimum at gerast veruleiki, tí vit skulu ikki bjóða ferðafólki 30 hitastig í julimánað ella ein svimjitúr í heitum keldum - tað lata vit danir og íslendarar um. Vit skulu bjóða teimum eina fragd fyri eygað í skiftandi ljósi, pollamjørka, ljósum nætrum, regni og anga av nýslignum grasi, vísa teimum útsýni frá Suðuroynni ein kláran dag, tá allar oyggjarnar liggja og slanga sær norðureftir í kvirruni, og oman í sjóvarmálan, tá brimið brýtur og sjógvurin leikar í. Vit hava stabbagrót og basaltfláir, kolanám og varðagøtur, og bygdir, ið allar hava eina søgu at siga frá....

Vit eru heppin at eiga grundarlagið at byggja hesa vinnu á, nevniliga eina náttúru, har tað er stutt frá fjalli til fjøru, frá bygdum landslagi til óbygt - náttúran er so tætt við, vit eru mitt í henni allatíðina, tað er okkara sermerki. Her kann skipast fyri alskyns túrum til gongu, í bili og báti. Og tann ferðandi kann fáa innlit í søgu okkara og mentan á allarbesta hátt, um vit ynskja tað - t.d.bara við at fylgja einum vanligum føroyingi, ið hevur seyð og bát - á rættina at klippa, í hoyna, út at fiska, eftir fugli o.s.fr. Nógvir føroyingar liva eitt "sermerkt lív" í mun til aðrir vesturlendingar, ið hava skift alla siðvenju út við nýggjan lívsstíl. Her hava vit framvegis eitt samfelag, sum livir og virkar - eisini - við eldigomlum siðvenjum í einum nútímans dagligdegi.

**Fiskur og handverk**

Vit hava gamlir bygningar, ið ríkja av søgu. Her sipi eg til bygningarnir hjá Thomsen, sum saman við kaiøkinum á Tvøroyri kundi verðið eitt spennandi og "livandi" portur til Suðuroynna. Her kundu útlendingar, eins og føroyingar - til dømis - farið á forkunnuga fiskarestauratión og keypt spennandi fiskarættir. Tí vit eiga heimsins bestu rávøru, sum kemur beinleiðis úr sjónum, og verður landað beint uttanfyri dyrnar. Farið á café, har føroyskir tónleikarir spældu, og notið eina føroyska øl og/ella ein føroyskan snaps (bryggjaður í oynni) ella ein góðan kopp av kaffi afturvið tónleikinum. Havt møguleika fyri at sæð føroyska framleiðslu, eitt framsýningarhøli, har tað um summarið var søluframsýning av føroyskum handverki úr leiri, glasi, steini, ull, horni, træi .... So kaiin aftur kundi verðið miðdepil, har fiskur verður landaður og virkaður, handilslívið mennist eins og mentanarlívið.

Vit hava hópin av fólki, ið kunnu vera við til at skapa forkunnugar ferðir, bæði í haganum, í fjøruni og undir vatnskorpuni, um tað skuldi verið. Kanska búgva tey ikki øll í oynni, summi eru stødd uttanlands í lestrarørindum, og onnur búgva kanska aðrastaðni í landinum, men tey vitja altíð um summarið. Tá hevði verið brúk fyri teimum í ferðavinnuni, eins og tað altíð var brúk fyri fólki í flakavinnuni um sumrarnar. Vit hava málkøn fólk, søgusigarar, kvæðarar, ævintýrarar og ... Men okkum tørvar ein persón ella eina eind, ið samskipar, planleggur, savnar træðrirnir og arbeiðir við Suðuroynni, sum eina heild, býtt upp í smærri eindir, ið t.d. allar hava sína seruppgávu. Havi nú tikið kaiøkið og Tvøroyri sum dømi um, at hetta kundi verið staðið, har fólk hittust um kvøldarnar, fóru út at eta og gistu. Í løtuni eru trý gistingarhús á staðnum, tvey miðskeiðis í bygdini, og tað triðja liggur í vøkrum umhvørvi við Á í Øravík. Hugsast kann, at tað eftirhondini gjørdist tørvur á fleiri, eins og onnur alternativ vórðu - eitt nú teltpláss. Vágur kundi t.d. verðið miðdepil og staðið fyri útferðum, bæði

*Framhald á næstu síðu*